# planet.fo

Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

## Muslimar onga atgongd

Í einari konsert hjá Black Eyed Peas í Malaisia vóru muslimar noktaðir atgongd.

-Muslimar mugu ikki luttaka. Ikki-muslimar kunnu fara avstað og hava tað stuttligt.

Soleiðis ljóða boðini frá Malaisiska mentamálaráðnum um eina Black Eyed Peas konsert, sum verður hildin í sambandi við hátíðarhaldinum av øl-gigantunum Guinnes á teirra 250 ára degi tann 25. september.

Sharialógin forðar muslimum at luttaka, tí ein rúsdrekka framleiðari stendur handan konsertina. Og tá ið meira enn helmingurin av íbúgvarunum í Malaisia eru muslimar, hevur stjórnin valt at greiða almenninginum frá, at muslimar í landinum skulu halda seg burtur frá konsertini.

Fyri stuttum var ein kvinna dømd pískasløg, tí hon hevði drukkið øl alment í landinum, har Sharialógin hevur stóran týdning. Tað vil tískil fáa stórar avleiðingar, um hendan lógin verður brotin. Tó hava fyrireikarar handan konsertina ikki hóming av, hvussu tey kunnu halda skil á hesum.

Black Eyed Peas framførdu til eina útselda konsert í 2007, har bæði muslimar og ikki-muslimar høvdu møguleikan at luttaka.

Áðrenn Black Eyed Peas framførdu í landinum, hevði stjórnin víst sína ónøgd við, at tónleikarar, ið sambært muslimunum í landinum, ikki vóru rætt ílatnir, hava framført í landinum. Sostatt hava Avril Lavigne og Gwen Stefani sambært muslimunum víst ov nógva húð undir teirra framførslum í høvuðsstaðnum Kuala Lumpur.



## Eykakonsert við Nashville-tónleikarum

Útselt er til stóru Nashville-konsertina á Hálsi leygarkvøldið, og tí hava fyriskipararnir gjørt av at skipa fyri eini eykakonsert.

Eykakonsertin verður í ítróttarhøllini á Hálsi kl. 18.00 leygarkvøldið, og útselda konsertin, sum upprunaliga skuldi byrjað kl. 20.00, er flutt til kl. 21.00.

Atgongumerki til eykakonsertina fáast á Statoil-støðunum kring landið, í Expert í SMS og í Soundcheck í Miðlon.

- Vit fegnast nógv um stóru undirtøkuna fyri Nashville-tiltakinum, sigur Petur Háberg Jacobsen, fyriskipari frá American Euro Link (AEL).

Leygarkvøldið á midnátt verður skipað fyri country-dansi í ítróttarhøllini á Hálsi, har Hallur Joensen, Ólavur Højgaard og Kim Hansen fara at spæla við føroyskum bólki.

**"Meltingarvegur" komin á gøtuna**

Nú er onnur fløgan eftir Garasjuguð, Meltingarvegurin, útkomin.

Á Meltingarvegnum er tónleikur settur til 18 yrkingar úr 8 ymiskum yrkingasøvnum hjá Tóroddi Poulsen sum eisini hevur staðið fyri løgunum.

Eins og á fyrru fløgunum, sum eitur "Rock Against Færøkitsch" og varð útgivin á vári í 2008, er talan um nakað av psykedeliskum kirkjupunki og óvaskaðum bluesrocki, men eisini meiri stillar framførslur við klaverpoetiskum undirspæli.

Meltingarvegurin er innspældur í upptøkuhølunum hjá Kaj Klein og hann hevur eisini staðið fyri upptøkuni, ljóðblandi og spælir millum annað ukulele og synthesizer. Garasjuguð sjálvur spælir guitar, sálmareiðhjól, klaver og eigur sjálvandi røddina. Navnframi Palle Hjorth, sum vit kenna úr Savage Rose og bólkinum hjá Peter Sommer spælir hammond, klaver og harmoniku og eitt sindur av synthesizer eisini. Joachim Ussing spælir bass eins og hann hevur gjørt tað fyri Lone Kellerman, Jomfru Ane Band og Niels Skousen.Trummuspælarin eitur Peter Dombernowski og hann spælir annars við heimskenda Howe Gelb í bólki hansara Giant Sand. Og Elin J. Smith syngur kór.

Plátufelagið Tutl er útgevari av Meltingarvegnum.

## The Reverends við síni fyrstu fløgu

Í dag kemur ein øðrvísi countryfløga á føroyska marknaðin. Talan er um útiseta¬bólkin The Reverends, sum letur fyrstu fløgu sína, "When You're Done", úr hondum.

Bólkurin hevur við hesi útgávu gjørt eina serstaka fløgu, við sínum egna ljóði og stíli, sum limirnir sjálvir rópa norðurlendskt americana.

Fløgan, sum er ein samansjóðan av country, bluegrass, suðurstatsrokki og hvat teir nú annars hava funnið uppá, er ljóðblandað av umbidna produsaranum Morten Bue. Sum gestatónleikara hava teir fingið ein av heimsins bestu steelguitaristum, Nils Tuxen, afturat sær.

Tey 10 løgini á fløguni kunnu best lýsast sum ein tónlistarlig ferð gjøgnum lívið, hjá tí einstaka menniskjanum, har pallurin er tann amerikanski landavegurin.

Limirnir í The Reverends eru allir føroyingar og búgva ávíkavist í Svøríki og Danmark. Teir hava ymiskar tónlistaligar bakgrundir og hava millum annað spælt í bólkum so sum Mold, MC Hár, Páll Finnur Páll, Mikkel Thomas Band og ikki minst Føroya Symfoniorkestri.

Hetta blandið er allarhelst orsøkin til at tónleikurin hjá bólkinum hevur sín heilt egna dám.

Bólkurin hevur í seinastuni spælt á ymsum festivalum, bæði innan- og uttanlanda, og er í løtuni í ferð við at leggja eina konsertrøð til rættis.

Nú ber til at hoyra lagið "You Gotta Go" á heimasíðuni og Myspace-síðuni hjá bólkinum.



**Limirnir í The Reverends eru:**

Niclas Thorsteinsson - Sang.
Janus Kampmann - Gittar.
Jens Virgar Jakobsen - Gittar.
Kristin Nolsøe Bech - Bass.